

## GOTT ÁR

*Hóast nótaskip úteftir hava staðið saman og hava mælt til samráðingarleiðina fram um at áseta eginkvotu, hevur hesin skipabólkur – av øktu makrelkvotuni – havt eitt rættiliga gott ár í ár*

> **... Føroyar eiga ein størri part enn Ísland av felagskvotuni...**
> JACOB VESTERGAARD

oyski parturin av kvotuni kundi fiskast upp við lutfalsliga fáum skipum eftir stuttari tíð – og enntá í at kalla reinari makrelveiði.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann hevur ikki gjørt endaliga av við seg sjálvan, hvussu stórur føroyski kvotuparturin skal verða fyri, at Føroyar skulu taka undir við eini nýggjari avtalu.

– Vit vita so nøkulunda, hvar »pínumarkið« er, og neyðugt verður at síggja, soleiðis sum samráðingarnar ganga, hvat ber til. Men vit vilja í hvussu er hava ein munandi størri part enn tað, vit høvdu í avtaluni fyri 2009, sum var minni enn 5% av heildarkvotuni – og soleiðis alt ov lítil, sigur hann.

Jacob Vestergaard er tó ikki trekur at ásanna, at høvuðsgýtingarøkið hjá makreli framvegis er vestanfyri Írland, og at bert ein lutfalsliga lítil partur av velduga makrelstovninum gýtir í føroyskum sjóøki, tó at egg og larvur vóru at finna víða um í okkara sjógvi.

– Men hóast høvuðsgýtingarøkið framvegis er vestanfyri Írland, kunnu vit ikki síggja burtur frá teirri stóru nøgd av makreli, sum vit nú vita leitar sær føði í okkara sjógvi og soleiðis etur burtur av tí, sum annar fiskur skal hava at liva av. Bæði yvirlitstrolingar hjá Havstovuni í summar og eftirfylgjandi kanningar hava víst, at makrelur er um stóran part av føroyskum havøki.

### Umfatandi kanningar

Býtið av makrelinum millum strandalond hevur sín upprunа langt aftur í tíðini, tá ferðingarmynstrið var heilt øðrvísi, enn tað er í dag. Hetta er allur sakkunnleiki her á landi sannførdur um, og hetta váttaði eisini Kjartan Hoydal, fiskifrøðingur og stjóri í NEAFC, yvirfyri Sosialinum fyrr í summar.

Hann segði, at hevði grundarlagið undir býtinum í dag verið eftirkannað, hevði býtislykilin avgjørt verið ein heilt annar.

– Men eitt er skjalatilfar. Annað er styrkin hjá londunum, segði hann í samrøðu við Rás2 og Sosialin.

Landsstýrismaðurin heldur, at øll londini, sum hava verið við í strandalandaavtaluni, skuldu stuðlað undir regluligar royndir fyri av nýggjum at fingið staðfest tær broytingar, sum verið hava í ferðingarmynstri og útbreiðslu av makreli.

– Kanningar skuldu verið gjørdar hvønn mánaða í árinum, soleiðis at haldgóð hagtøl vórðu fingið til vega, men ES heldur upp á, at felagsskapurin longu hevur ta vitan, sum er neyðug.

Jacob Vestergaard sigur at enda, at russar hava fiskað makrel undir Føroyum, síðan samstarvið við teir byrjaði í seinna helmingi av sjeytiárunum, og síðan fyrst í áttatiárunum hevur makrelveiðan hjá teimum verið skrásett.

*vilmund@sosialurin.fo*










*Hesar myndirnar eru tiknar umborð á verksmiðjuskipinum Norðborg, sum hevur gjørt eitt framúr gott ár í ár*